gult cyan magenta svart



Helena Dam á Neystabø:

# Flokkurin skal vera sjónligari

**Verður Helena Dam á Neystabø leygardagin vald til ovasta politiska leiðara Sjálvstýrisfloksins, lovar hon, at Sjálvstýriflokkurin fer at verða marknaðarførdur betur. Eingin skal ivast í, hvat hann stendur fyri**

FORMANSVAL
*John Johannessen*

Helena Dam á Neystabø ætlar sær at leggja stóra orku í, at Sjálvstýrisflokkurin verður meira sjónligur fyri veljarafjøldini, verður hon vald til fyrsta politiska formann floksins á fundi í Havn leygardagin.

– Eg ætli mær at leggja dent á, at vit fáa ein virknari flokk, sum eisini fær størri ávirkan. Vit skulu fríska upp ímyndina av flokkinum eitt sindur og syrgja fyri at marknaðarføra flokkin væl, sigur Helena Dam á Neystabø.



*Helena Dam á Neystabø*

### Ynskt til formann

Helena Dam á Neystabø sigur, at Suðurstreymoyar Sjálvstýrisfelag ynskir, at hon skal gerast formaður í flokkinum. Felagið hevur heitt á hana um at stilla upp til formansvalið, og tað ger hon fegin.

– Eg havi sjálv verið virkin í politikki floksins síðani 1990, og eg haldi, at tað er áhugavert og avbjóðandi at hava ein virknan leiklut. Hetta er eisini nakað, sum hevur givið úrslit í fullveldismálinum, har vit hava fingið ein nýggjan leist, sum er júst tað, sum Sjálvstýrisflokkurin vil í ríkisrættarliga spurninginum, sigur Helena Dam á Neystabø.

Helena Dam á Neystabø vil ikki svara, hví hon heldur seg vera eitt betur valevni til formanssessin enn Sámal Petur í Grund, sum stillar upp ímóti henni. Hon vísir á, at spurningurin er ikki at vera betur. Tað eru lokalfeløgini, ið hava heitt á tey bæði um hvør í sínum lag at stilla upp, og tað heldur hon vera í lagi.

Men Helena Dam á Neystabø dylur kortini ikki, at hon heldur, at hon er væl egnað sum formaður. Hon vísir enn einaferð á, at hon hevur verið virkin í politiska lívinum í tíggju ár.

Helena Dam á Neystabø vísir á, at hon var virkin í nítiárunum, tá tað leikaði hart á í Føroyum, og hon er virkin nú, tá stórar avbjóðingar standa fyri framman á ríkisrættarliga økinum. Og í hesum sambandi vísir hon aftur á, at tað hevur eydnast henni at førka fullveldisætlanina til stig fyri stig loysnina hjá Sjálvstýrisflokkinum.

Men væntar Helena Dam á Neystabø at vinna formansvalið?

– Eg havi ikki verið úti og kannað, hvør atkvøður fyri mær, men eg veit, at eg fái fullan Stuðul í Suðurstreymoyar Sjálvsstýrisfelag, sigur Helena Dam á Neystabø.

---

Sámal Petur í Grund:

# Ætlar sær at savna flokkin

**Verður Sámal Petur í Grund valdur til formann í sjálvstýrisflokkinum, lovar hann, at flokkurin fær eitt betri samstarv innanfloks, so fólk sleppa undan at hoyra ymsar mótstríðandi útsagnir í fjølmiðlunum**

FORMANSVAL
*John Johannessen*



*Sámal Petur í Grund*

Sjálvstýrisflokkurin skal vera ein miðflokkur, og hann skal ikki koma við ymsum útmeldingum í sama máli.

Hetta er nakað av tí, sum Sámal Petur í Grund lovar, verður hann valdur til ovasta politiska leiðara Sjálvstýrisfloksins á fundinum í Havn komandi leygardag, tá politiskur formaður skal veljast fyri flokkin á fyrsta sinni.

– Verði eg formaður, verður fyrsta broytingin tann, at flokkurin fer at tala við einari tungu. Hetta er nakað, sum Sjálvstýrisflokkurin hevur brúk fyri. Hann má savnast, sigur Sámal Petur í Grund.

Sámal Petur í Grund harmast um, at Sjálvstýrisflokkurin ofta, til dømis í fullveldismálinum, kemur við útmeldingum, sum stríða ímóti hvørjari aðrari. Hann er ónøgdur við, imir floksins koma ofta samstundis við viðmerkingum, sum hella meira sambandsvegin og viðmerkingum, sum hella meira fullveldisvegin.

– Hetta er nakað, sum eg ætli mær at gera nakað við. Flokkurin skal vera ein miðflokkur, ger Sámal Petur í Grund greitt.

### Fær góða undirtøku

Sámal Petur í Grund hevur eitt sindur ilt við at svara uppá, hví hann heldur seg vera betur egnaðan til politiskan formann í Sjálvstýrisflokkinum enn mótvalevnið, Helena Dam á Neystabø.

Men eftir at hava dvølt á spurninginum eina løtu, sigur Sámal Petur í Grund, at hann heldur seg hava betur stuðul millum veljararnar enn Helena Dam á Neystabø.

– Til seinasta fólkatingsval fekk eg heilar 1.119 atkvøður, meðan Helena Dam á Neystabø fekk millum 3 og 4 hundrað, vísir Sámal Petur í Grund á.



Poul Nyrup Rasmussen:

# Danmark skal avgera føroyskt fullveldi



*Danski forsætisráðharrin leggur aftur upp til rok um fullveldismálið. Í nýggjum brævi til landsstýrið staðfestir hann brævið frá 14. januar, har hann sigur, at danir gera av, um Føroyar fáa fullveldi ella ei*

**Danski forsætisráðharrin hevur enn einaferð gjørt landsstýrinum greitt, at tað í seinasta enda eru danska stjórnin og Fólkatingið, ið gera av, um Føroyar skulu fáa**

SJÁLVSTÝRISÆTLANIN
*John Johannessen*

Poul Nyrup Rasmussen er sinnaður at gera eina avtalu við føroyingar um at broyta heimastýrislógina og gera eina nýggja skipan innan fyri ríkisfelagsskapin.

Men samstundis stendur danski forsætisráðharrin fast við, at fólkarættarliga og ríkisrættarliga støða føroyinga ikki verður broytt. Føroyingar skulu sambært Poul Nyrup Rasmussen ikki vænta sær, at tað á einari fólkaatkvøðu skal bera til at samtykkja eina grundlóg, sum staðfestir Føroyar sum fullveldisríki og so vera fullveldisríki.

»Hvis den færøske befolkning på et tidspukt i fremtiden træffer beslutning om at træde ud af riget, vil det således efter grundloven være nødvendigt med et samtykke fra regeringen og Folketinget. Den ændring af hjemmestyreordningen, som der nu indføres forhandlinger om, vil naturligvis ikke kunne ændre herpå.«

Soleiðis skrivaði danski forsætisráðharrin í brævi til løgmann 14. desember í fjør, og hetta staðfestir hann aftur í fáorðaðum brævi 2. januar í ár, eftir at Anfinn Kallsberg 18. desember í fjør svaraði fyrra brævinum og greiddi frá nýggju sjálvstýrisætlan landsstýrissins.

Sostatt staðfestir Poul Nyrup Rasmussen einaferð enn, at Føroyar eru ikki tjóð, og hava vit tískil ikki rætt til sjálv at gera av, um vit skulu hava fullveldi ella ei. Ein føroysk fólkaatkvøða, sum sigur ja til fullveldi, er einki verd fyrr enn danska stjórnin og Fólkatingið hava góðkent hana.

### Halda fram við koyriætlanini

Tað hevur ikki borið til at fáa viðmerkingar frá løgmanni ell Høgna Hoydal til nýggjasta brævið frá danska forsætisráðharranum. Tá Sosialurin royndi at fáa fatur á teimum, sótu teir á týdningarmiklum landsstýrisfundi og kundi ikki órógvast.

Men sum skilst, tekur brævið ikki mótið frá landsstýrinum. Landsstýrið miðar framvegis eftir at yvirtaka øll málsøki uttan ríkismál eftir einum føstum leisti, niðurlaga blokkstuðulin og so leggja eina koyriætlan fram móti føroyska fullveldinum.

Danski forsætisráðharrin er sinnaður at gera eina líknandi avtalu, men hann tekur kortini ikki undir við, at talan skal vera um eina avtalu, sum er ein liður í einari skipaðari fullveldisætlan.

Í brævinum frá 14. desember 2000, sum Poul Nyrup Rasmussen aftur staðfestir fyri landsstýrinum í brævi 2. januar í ár, ger danski forsætisráðharrin greitt, at endamálið við samráðingunum nú er at broyta heimastýrislógina, soleiðis at vit fáa eina nýggja skipan millum Danmark og Føroyar innan fyri ríkisfelagsskapin.

Poul Nyrup Rasmussen ger púra greitt, at talan ikki verður um samráðingar um fullveldi. Samráðingarnar skulu ikki fatast, sum at talan verður um nakra broyting í ríkisrættarligu støðu Føroya.

Tað ber ikki til at fáa at vita frá landsstýrinum, um ætlaðu samráðingarnar millum ebætisfólk hjá báðum pørtunum eru byrjaðar. Men mangt bendir á, at tað eru tær ikki.

Tí hevur landsstýrið skund, skal tað eydnast at fáa í lag eina avtalu um at broyta heimastýrislógina í januar, eins og løgmaður hevur lovað. Men hetta ætlar landsstýrið. Meiningin er framvegis, at føroyingar skulu til eina fólkaatkvøðu í apríl um eina koyriætlan fram ímóti fullveldinum.

Tá komið er til endan av koyriætlanini, er framvegis meiningin, at føroyingar skulu til fólkaatkvøðu um eina føroyska grundlóg, sum staðfestir Føroyar sum fullveldisríki.

Landsstýrið er framvegis sannført um, at Føroyar eru tjóð, og at vit hava sjálvsavgerðarrætt, sum merkir, at vit sjálv kunnu gera av at taka fullveldi.

---

# Leitar eftir vinarbýi í Føroyum

**Íbúgvarnir í danska býnum Skovlund hava á einum borgarafundi í fjør avgjørt, at býurin skal finna sær vinarbýir í Føroyum. Benny Drewsen, fyrrverandi handilsmaður í Havn, nú búsitandi í Skovlund, er í løtuni í Føroyum og leitar eftir hesum vinarbýum**

BÝARSAMSTARV
*Rúnar Reistrup*

Benny Drewsen, sum í tredivu ár var búsitandi í Havn, er komin til Føroya á einum av sínum mongu ferðum aftur. Men hesaferð hevur hann eina heilt serliga uppgávu. Hann skal nevniliga royna at finna danska býnum Skovlund, har hann hevur búð síðan 1995, ein ella tveir vinarbýir í Føroyum.

Hann er longu væl á veg at fáa samband í lag við eina bygd í norðara parti av Føroyum og leitar nú eftir einari bygd í Suðuroynni ella Sandoynni.

Skovlund, ið liggur 43 kilometrar norðan fyri Esbjerg millum Varde og Grinsted hevur 650 íbúgvar og kundi hugsað sær samband við føroyskar bygdir á umleið somu støðd.

At Skovlund skuldi finna sær vinarbýir í Føroyum bleiv avgjørt á einum borgarafundi í fjør. Fýra føroyingar búgva í býnum, og hetta var beinleiðis orsøkin til at tað júst er í Føroyum, at býurin leitar sær eftir vinarbýi.

Benny Drewsen skuldi kortini til Føroya um jóltíðir, og bjóðaði sær til at royna at fáa samband í lag við onkra føroyska bygd. Og tað hevur hann so roynt.

### Fjølbroytt samband

Benny Drewsen gjørdist noyddur at fyta úr Føroyum vegna sjúku fyri fimm árum síðan. Tá hevði hann búð her í landinum í tredivu ár. Og hóast tað var hugtungt at flyta, so trívist hann væl í Skovlund, sigur hann.

– Býurin hevur eitt ríkt mentunarlív og har er øgiliga pent, sigur Benny.

Ynski hjá íbúgvunum í Skovlund er at sambandið við vinarbýin í Føroyum skal knýta persónlig, ítróttalig og mentunarlig bond millum íbúgvarnar í býunum báðum.

– Harafturat ynskti borgarstjórin eisini at fáa samband í lag við kommunalpolitikararnar í býunum báðum, sigur Benny Drewsen.

Føroysku býirnir ella bygdirnar, ið eru áhuga at vita meira um vinarbýartiltakið, kunnu venda sær beinleiðis til Benny Drewsen, annaðhvørt á telefon (+45) 75 29 22 03 ella við at skriva til hann á adressuni Borgergade 6, 6823 Skovlund-Antager.

– So kunnu tey fáa tilfar sendandi og fáa meir at vita um býin, og hvat hann hevur at bjóða, sigur Benny Drewsen.